# Nordens blåøyde og misfornøyde oljesjeiker



*Um vikuskiftið varð skipað fyri skeiði í oljujournalistikki. Arnt Even Bøe, sum tekur sær av oljuskrivingini á Stavanger Aftenblad, stóð fyri skeiðnum, sum má sigast at hava verið væl timað, tí tað byrjaði samtíðís sum tíðindini bórust um fyrsta oljufundið á landgrunninum. Arnt Bøe hevur skrivað grein til dagsins blað, har hann við støði í norsku royndunum heitir á føroyingar um at vera varnar. Hann vónar ikki, at tað verður funnin alt ov nógv olja*

*Mynd Jan Müller*

**Norge er klodens tredje største eksportør av olje. Får ikke håpe våre venner på Færøyene finner like mye olje som oss. Norden trenger ikke flere blåøyde og misfornøyde oljesjeiker**

*Av Arnt Even Bøe, journalist i Stavanger Aftenblad*

Norsk oljepolitikk har i alle år gått ut på å tilføre eierne av ressursene, det norske folk, størst mulig andel av verdiene i havbunnen. Det har vært en todelt suksess. Vi har aldri vært rikere - og mer misfornøyde enn nå.

Middelet har vært å bygge opp best mulig egen oljekompetanse over hele spekteret. Det har blant annet resultert i to delstatlige oljeselskap, Statoil (82 pst.) og Norsk Hydro (43). (Private Saga ble for lite til å stå imot oljeprisfallet for et par år siden, og ble slukt av Hydro.) Statoil er blitt et internasjonalt oljeselskap med rundt 14.000 ansatte i over 20 land.

### Statens oljegull

Størst av alle er det direkte helstatlige og nyetablerte selskapet Petoro (tidligere SDØE – statens direkte økonomiske engasjement). Det sitter i nesten alle oljelisensene på norsk sokkel og forvalter nærmere 40 prosent av de totale olje og gassreservene på statens vegne. Verdien av dette ligger på rundt på 500-550 milliarder kroner, avhengig av oljeprisen og dollarkursen - selvfølgelig. Dette fører statlige Petoro (olje-gull) opp blant verdens 4-6 største oljeselskap når det gjelder reserver. I fjor gikk det nærmere 100 milliarder kroner fra Petoros eierandeler og rett inn i den norske statskassen. Puh.

### 80.000 i oljå

I tillegg til oljeselskapene er det bygd opp en sterk leverandørindustri over et bredt spekter, fra små smarte inovasjonsbedrifter til offshoreverftene i Kværner og Aker Maritime med flere tusen ansatte. Til sammen arbeider 70-80.000 nordmenn i direkte tilknytning til oljevirksomheten. Svært ofte spennende og godt lønte jobber med mange frynsegoder.

### Alle milliardene

Lille julaften i år er det 32 år siden Ekofisk, det første norske oljefeltet, ble funnet. Siden den gang har nesten alle de store oljeselskapene etablert seg i Norge. I fjor sopte den norske stat inn 92 milliarder kroner i skatt fra disse selskapene, som beskattes med 78 prosent (noe som gir gode fradragsmuligheter). Selskapsskatten tilsvarer rundt 20.000 kroner per nordmann (nærmere to millioner per færøying). I tillegg til skattepengene og kontantstrømmen fra Petoro, håver staten også inn utbytte fra Statoil og Hydro. Puh....

### 12 mill. hver

Ola nordmann tjener nå så mye på oljevirksomheten at pengene ikke lenger kan brukes, innenlands fordi økonomene truer med superinflasjon og nedlegging av eksportrettede arbeidsplasser i fleng. Det er også enighet om at også kommende generasjoner skal få sin del av petroleumsformuen. Derfor vil den gjeldfrie norske stat snart ha godt over 500 milliarder kroner stående i utenlandske verdipapirer og aksjer. Det er rundt 120.000 kroner per nordmann. Om denne oljeformuen var Færøyenes, ville hver og en av dere representert en formue på 12 millioner kroner i utenlandske verdipapirer. Verre kan det nesten ikke bli.

### 100 år til

Dersom Amerada Hess nu har funnet et drivværdig olje- eller gassfelt på den tredje boringen på færøysk sokkel, er det meget specielt. I den norske delen av Nordsjøen ble det boret over 30 i løpet av tre år før det historiske Ekofiskfunnet. Siden har Norge bygd seg opp til å bli verdens neste største eksportør av olje ved hjelp av godt over 2000 hull i sokkelbunnen. Mange land produserer mer, men siden Norge bruker så lite selv, holder en eksport på rundt tre millioner fat, (477 millioner liter) til tredje etter Saudi-Arabia og Russland. Og fortsatt kan Norge ifølge ekspertene produsere olje i 50 år og gass i 100. Det er nesten ikke til å holde ut.

### Hva med fisken?

I den norske delen av Barentshavet brukte oljeselskapene langt over 10 milliarder kroner på mer enn 50 brønner, før de fant oljefeltet Goliat. Nå vil den norske regjeringen ha nye miljøutredninger før det italienske operatørselskapet Agip eventuelt får bygge ut feltet og sette det i produksjon. Blant annet fordi forskere ved Havforskningsintituttet har funnet ut at såkalt produsert vann, vann som er skilt ut fra oljen og gassen i brønnstrømmen, skader fisken. Dette vannet inneholder ørsmå forekomster olje og pumpes ut i havet i store mengder. (Fra gamle felt kommer det mye mer produsert vann enn olje, og totalt i Norge slippes det ut over 120 millioner kubikkmeter produsert vann (over 750 millioner fat) vann i år.

### Feminin hannfisk

Laboratorieforsøk har vist at de såkalte alkyfenolene i det produserte vannet kan mistenkes for å ha samme virkninger som det kvinnelige kjønnshormonet østrogen og kan bidra til å påvirke reproduksjonen hos fisk. Resultat kan bli hunnfisk som gir mindre rogn og hannfisk med hunnfiskproteiner. Hva skjer da med reproduksjonen?

Før den endelige rapporten gis ut, strides ulike forskergrupper og oljeindustrien om hvor alarmerende dette er. Ankepunktene er at fisken i havet ikke er stasjonær og at den derfor heller ikke utsettes for så sterke konsentrasjoner over så lang tid som i laboratorieforsøkene.

### Vellykket, men

Jeg har levd i dette landet alle mine i 53 år. Og jeg vet at oljå har endret Norge dramatisk. Det har vært en ønsket, og i økonomisk sammenheng svært så vellykket forandring. Vi rangeres som ett av klodens aller rikeste og «beste» land å bo i. Men målt ut fra den generelle norske sutring og klaging får rikdommen oss bare til å være enda mer uforstående til at eldreomsorgen svikter, at sykehuskøene vokser og skolene forfaller. Og det er kanskje her det største problemet ligger: Det kommer verken helsepersonell, lærere eller lykke opp av oljebrønnene. Men forventninger. Puh.

Fordi det skjer noe med et folk som er så rikt at det bare kan bruke brøkdeler av si enorme formue. Det blir verken gladere eller mer lykkelig, antakelig bare mer egoistisk og misfornøyd.

Derfor blir det spennende å se hvorledes det går med oljeleterne på færøysk sokkel. Får håpe de ikke finner for mye. For færøyingenes egen del. Kloden trenger ikke flere blåøyde og misfornøyde oljesjeiker.

# Amerada vágaði og fann olju – meðan British Gas ikki vildi vera við

OLJULEITING

*Jan Müller*

Eftir øllum at døma hava føroyskir myndugleikar valt rætta oljufelagið, tá avgjørt varð at veita The Faroes Partnership leitiloyvi við amerikanska felagnum Amerada Hess sum operatøri. Og helst hevur føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni eisini valt rætta samtakið at samarbeiði við. Tí tá Sovereign Explorer herfyri varð liðugur við upprunaligu boriætlanina valdi Amerada Hess saman við Dong at taka allan vágan á seg og bora 200 til 300 metrar longur niður. Gassspor gjørdu, at Hess trúði uppá olju niðriundir. Men bretska felagið British Gas trúði eftir øllum at døma ikki, at olja var longur niðri og vildi tí ikki vera við til at bora teir seinastu hundrað metrarnar. Og tað var tá at Sovereign Explorer rakti við olju og gass.

Internetsosialurin veit at siga frá vælvitandi keldum, at leiðslan í Amerada Hess metti møguleikarnar at raka við olju, um farið var longur niður, vera so góðar, at tað saman við Dong átók sær allan vágan. Í oljuvinnuni er tað so, at metir eitt felag í einum samtaki, at tað ikki vil vera við til at fíggja eina víðkaða boring, so hevur tað heimild at lata vera. Og skal tað aftur gerast partur av einum møguligum fundi skal tað keypa seg inn aftur í samtakið. Og tá kostar hetta nógv.

Amerada Hess er annars kent fyri, har tað leitar eftir olju ymsa staðni í verðini, at taka risikoir. Og eftir øllum at døma er tað hesin leitingarpolitikkurin, sum hevur givið úrslit. Spurningurin er so bara, um tann oljan sum er funnin er nóg mikið til eina lønandi framleiðslu.

Teir góvust við boringini fríggjadagin og logga framvegis í brunnimnum. Eftir ætlanini verður tíðindafundur í Oljumálastýrinum fyrrapartin mánadagin, tá Eyðun Elttør fer at leggja fyribils úrslitið av boringini fram. Bløðini skrivaðu leygardagin, at olja er funnin. Tað skilst, at tað ikki er útilokað, at eitt møguligt oljufund røkkur inn á bretskt øki eisini. Stóri spurningurin er nú, hvussu tjúkt lagið við olju og gassi er, og hvussu langt tað røkkur. Tað ljóðar, at lagið er so mikið tjúkt, at talan kann blíva um eitt lønandi fund.

Tað hevur ikki eydnast internetsosialinum at fáa eina viðmerking frá British Gas í London. Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess hevur onga viðmerking til boringina ella tíðindi um, at British Gas ikki vildi vera við til seinasta partin av boringini.



*Føroyski stjóri í Amerada Hess, Ben Arabo hevur uttan iva havt ein fingur við í spælinum, tá ovasta leiðsla í felagnum átó.k sæa meginapartin av váganum fyri at bora longur enn ætlað og har fann olju. Her vitjhar Ben Arabo á boripallinum Sovereign Expolorere um júst hetta mundið*

*Mynd Jan Müller*



# Atlantic Petroleum funnið olju við Føroyar

**Lagnunnar speisemi skuldi tað verða eitt føroyskt oljufelag, sum varð við til at finna fyrstu oljuna við Føroyar. Fyri teir umleið 2000 føroysku partaeigararnar í olufelagnum Atlants Kolvetni er tað einki minni enn ein kollvelting, at júst teirra felag skuldi vera fyrsta oljufelagið saman við øðrum at finna olju við Føroyar. Í gjár varð kallað inn til partaeigarafund í felangum. Í hesum sambandi hevur felagið sent út tíðindaskriv**

OLJUFUND

*Jan Müller*



*Eyðun Elttør peikar á staðið, har Amerada Hess hevur funnið olju, og neyvan er hann vónsvikin av, at eitt føroyskt oljufelag er við í leitingini hjá Hess*

*Mynd Jan Müller*

Har verður sagt, at Atlantic Petroleum hevur saman við Amerada Hess og DONG funnið kolvetni í føroysku undirgrundini. 20. september varð farið undir at bora í føroyska loyvinum 001 og seinast í boringini varð rakt við kolvetni.

Komið varð fram á olju og gass á einum 170 metra strekki. Liðið er nú so langt út á árið at brunnurin verður ikki kannaður meira gjølla nú. Tá vanligar mátingar eru gjørdar verður brunnurin afturlatin.

Í eini viðmerking til hesa stórhending sigur Kjartan Hoydal, nevndarformaður:

’Hetta er næstan ov gott at vera satt. Einasta føroyska oljufelag finnur olju í sínum fyrsta brunni. Hetta vísir meira enn nakað annað, at Atlantic Petroleum valdi rætta samtakið at fara upp í. Hetta er sera áhugavert fyri teir 2000 partaeigararnar, ið hava sett pening í felagið. Atlantic Petroleum verður eitt fyridømi fyri hvussu farast skal fram tá bygt verður upp nýtt vinnuligt virksemi’.

Víðari sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum: ’Hetta er sjálvsagt ein stórhending fyri felagið. Vónirnar vóru stórar til fyrsta brunnin, men ikki var vist at eydnan skuldi vera við felagnum fyrstu ferð. Tó er hettar ikki einasti møguleiki hjá felagnum. Atlantic Petroleum fekk fyri nøkrum vikum síðan góðkenning frá ensku myndugleikunum at leita eftir olju og gassi í ensku undirgrundini. Atlantic Petroleum er við í ensku loyvunum P.1027 og P.1029, saman við somu samstarvsfeløgum, sum á Føroya leiðini’.

Brunnurin 6004/16-1z liggur upp at enska sjómarkinum, á 975 metra dýpið. Upprunaliga var ætlanin at bora 3.830 metrar niður í havbotnin, men tá komið var niður á hetta dýpið varð avgjørt at fara longur niður. Borað varð síðani niður á 4.275 metrar, og tað var í hesum niðasta partinum at olja og gass var funnið. Í fyrsta partinum av boringini luttóku øll fýra feløg í The Faroes Partnership, men tá komið var niður á 3.830 metrar valdi BG at taka seg burturúr. Teir síðstu metrarnir vóru boraðir undir eini sokallaðari ’sole risk’ avtalu millum Amerada Hess, Dong og Atlantic Petroleum. Atlantic Petroleum hevur møguleikan at luttaka í samtakinum við einum ognarparti uppá 5 %.



*Poul Mohr, nevndarlimur, Wilhelm Petersen, stjóri og Mortan Johannesen, nevndarlimur í Atlants Kolvetni vistu neyvan av, tá teir vitjaðu á boripallinum Sovereign Explorer herfyri, at olja varð funnin undir teimum*

*Mynd Jan Müller*

# »Kjempe flott«

**Við úrslitinum hjá Amerada Hess er føroyski landgrunnurin longu ein nýggj oljuprovins. Og skuldi tað hent, at hetta fyrsta fundið ikki er lønandi, so eri eg vísur í, at tað fara at verða gjørd onnur fund, sum eru kommerciel sigur norski jarðfrøðingurin Terje Hagevang, sum sjálvur ikki ivast í, føroyska undirgrundin goymir nógva olju**

OLJUFUND

*Jan Müller*



Sosialurin

Oljan verður funnin í ár

*Terje Hagevang var beinrakin, tá hann fyrr í ár segði við Sosialin, at olja fór at verða funnin í ár*

Øll minnst vit bjørtskygdu yvirskriftina í Sosialinum herfyri "Olja verður funnin í ár". Tað var kendi norski jarðfrøðingurin Terje Hagevang, sum hevur hollar royndir at arbeiða við føroyaøkinum – sum eftir tveir turrar brunnar – loyvdi sær at halda, at triði brunnurin fór at geva fund. Og sum vit nú hoyra rakti hann í blett.

Nú fund er gjørt, tó at vit ikki vita, um talan er um eitt lønandi fund, dylur Terje Hagevang ikki fyri, at hann er sera fegin um fyribils úrslitið av boringini.

"Jeg er overbegejstret over at der faktiskt er gjort et fund. Detter er vældig flot.. Ja kjempe flot" Sigur TerjeHagevang, sum kanak meira enn nakar hevur fylgt leitingini í Føroyum. Og hóast man enn ikki veit, um talan er um eitt lønandi fund sigur hann: "Dette ser svært lovende ud" sigur hann og vísti til tíðindini um, at kolvetnisberandi fláirnar eru 170 metrar tjúkkar.

Terje Hagevang sigur, at hevði úrslitið av hesi boringini verið vánaligt, so hevði tað kunnað fingið sera negativar avleiðingar fyri leitivirksemi øllum økinum. Nú hendir tað júst øvugta. Øll oljufeløgini eisini á bretskum øki hava fylgt hesi boringini við stórum áhuga, nú eingi fund hava verið gjørd á Atlantsmótinum leingi. –At úrslitið er lovandi er positivt uppá ein nógv størri hátt enn bert fyri henda eina brunnin. Tað ger, at størri áhugi verður bæði fyri føroyaøkinum og øllum Atlantsmótinum sum so.

Hann sigur, at av tí at man hevur gjørt eitt fund á einum dýpi man ikki hevði roknað við merkir so aftur, at man kann rokna við at gera fund eisini á restini av landgrunninum og ikki bara í Gullhorninum og í øðrum løgum eisini.

Úrslitið vísir, at sandur er í nógvum løgum, og tað er sera lovandi.

Terje Hagevang heldur, at Føroyar longu hava verið á altjóða oljukortinum. Men við hesum fundimnum kann man siga, at føroyski landgrunninum er ein nýggjur oljulandslutur.

Norski jarðfrøðingurin, sum herfyri segði, at tað fór at verða funnin olja í hesum brunninum vil leggja aftrat, at skuldi tað hent, at hetta fundið ikki er kommercielt, so fara tað at koma onnur fund, sum verða tað. So hann ivast ikki í, at tað er nógv olja í føroysku undirgrundini. Spurningurin er bara at vísa tol og leita miðvíst.

## Óhapp umborð á West Navion

OLJULEITING OG TRYGD

*Jan Müller*

Herfyri hendi eitt óhapp umborð á boriskipinum West Navion, tá tað boraði fyri BP í Assyntbrunninum beint hinumegin markið. Ein tyrla kom so mikið skeivt fyri á tyrludekkinum umborð, at ein maður breyt beinið. Óhappið var annars so álvarsligt, at West Navion mátti hála borin upp og fara til Noregs við skaddu tyrluni. Hetta hevur gjørt, at tað hevur ikki verið borað í fleiri dagar. Sosialurin skilur, at boringin verður uppafturtikin og at hon líðir væl. Føroyska frálandaskipið Faroe Connector liggur hjá boriskipinum, tá tað borar. Einki er komið fram um boringina annars. Onkur fuglur hevur sungið um enn eitt turt hol á Atlantsmótinum. BP hevur ongar viðmerkingar.